**Tit ringja — vit skriva**
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar:**
Lýsingarmaður okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingaspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran.

# Tey ungu gera flestu skaðar í ferðsluni

**Tey ungu í Føroyum — millum 18 og 25 ár — gera flestu skaðarnar í ferðsluni. Av tilsamans 2653 skaðar í 1982 gjørdu ung millum 18 og 25 ár 1145 skaðar. Nógvir av hesum skaðum hendu í tíðini frá klokkan 22 til 06, tá annars lítil ferðsla er í gøtunum.**

Í døgunum frá 22. til 27. mars var ein ferðsluvika hildin í Sølumiðstøðini í Havn. Tað var Sølumiðstaðarfelagið, sum skipaði fyri hesi ferðsluvikuni. Hetta felag er ein samtøka av øllum handlunum á Trapputrøðni.

Umboð fyri løgregluna, Ráðið fyri Ferðslutrygd, Bileftirlitið, Koyrilærarafelagið, Tryggingarsambandið o.o. vístu ymiskt fram og greiddu frá.

Seinasta dagin á vikuni var eitt panelorðaskifti um ymsar ferðsluspurningar. M.a. greiddi Marius Thomasen, stjóri í Tryggingarsambandinum fra hagtølum yvir ferðsluskaðar í Føroyum í fjør. Hann vísti á, at tey ungu millum 18 og 25 ár eru atvoldin til flestu skaðarnar í ferðsluni.

Av tilsamans 2653 skaðum í ferðsluni í 1982 gjørdu tey 18 ára gomlu 267, tey 19 ára gomlu 226, 20 ár 132, 21 ár 136, 22 ár 108, 23 ár 111, 24 ár 90 og 25 ár 75 skaðar. Tey millum 26 og 39 gjørdu tilsamans 835 skaðar ella 60 í meðal, tey 40 til 49 ára gomlu gjørdu 35 skaðar í meðal, tey 50 til 59 gjørdu 20 og tey 60 til 69 gjørdu 11 skaðar í meðal.

Marius Thomasen vísti eisini á, at teir flestu skaðarnir, sum tey unug gera, henda millum klokkan 22 og 06. Hetta er tíðin tá tey fara í dans og úr dansi, og tá eingin onnur ferðsla er. So tíðarskeiðið gevur okkum eina týðuliga ábending um, at tað eru tey ungu, sum gera hesar skaðarnar.

Stjórin í Tryggingarsambandinum spurdi í hesum viðfangi løgregluna um, hví hon ikki ger meira við at hava fólk úti um náttina fyri á tann hátt at fyribyrgja skaðum.

Hann helst fyri, at løgreglan hevur ikki tikið til eftirtektar, at 18% av øllum skaðum henda í tíðini millum kl. 22 og 06. Heldur átti løgreglan at innrætta sítt arbeiði eftir hesum samroyndum.



**Litla Elin leitaði saman við foreldrunum niðan á Trapputrøðna at siggja hvussu vit eiga at fyrihalda okkum í ferðsluni og ferðslan eigur at fyrihalda sær fyri okkum**


Marius Thomasen legði dent á, at tað eru teir ungu og óroyndu bilførararnir, ið júst hava fingið koyrikort, sum gera flestu skaðar. Hagtølini vísa eisini, at tað eru mannfólkini, ið gera flestu skaðarnar.

Hagtølini fyri 1982 vísa, at 4 menniskju doyðu í ferðsluni og haraftrat vóru 91 skaðar. Mannfólk gjørdu teir 63 skaðarnar, meðan kvinnurnar gjørdu 32.ä

Undir orðaskiftinum kom ymiskt annað fram eisini. Eitt nú at tað var eitt ynski, at ein hálkibreyt verður gjørd í Føroyum.

Olivur Næs frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd greiddi frá, at 1983 er Norðurlendskt Trygdarferðsluár, og vónaði hann, at vit føroyingar fara at geva hesum árinum gætur. Hann vísti m.a. á tann týdning tað hevur, at hvør einstakur í ferðsluni kennir sína ábyrgd.

**Jan**



**Panelið í SMS. Marius Thomasen greiðir frá**

**Framhald av síðu 11**

minst til kennar í tokka sínum til heimbygdina Rituvík. Av teimum blaðgreinum, ella ritgerðum hann hevði um heimbygd sína, um ymiskt føroyskt fyritaksemi, torvskurð o.a., sum hann ikki bert festi á blað, men eisini fekk avmyndað, eisini í ljósmyndum, kemur vit tíðuliga nærlagni hansara.

Vit sum komu at starvast saman við Johan Højgaard í mong ár, minnast hann sum hin vinsæla og hugagóða, sum gjørdist serliga væl hýrdur, um tú gavst tær stundir til at skifta orð um viðurskifti, ið høvdu samband við føroyska gerandisdagin.

Hann hevði ikki bara ættarkensluna í sær, var tein teirra sum veruliga hevði ans fyri tí virðismikla, at tú gevur tí gætur sum ættirnar hava borið hvør aðrari.

Hesum virðum, sum hann metti av stórum týdningi fyri lívið her á landi.

Trúfesti hansara yvirfyri ætt, vinum og kenningum var stórt.

Hjá Siggu, konuni og børnunum er saknurin svárur.

Við tykkara tungu sorg kenna vit djúpa samkenslu.

**Jákup Lindenskov**



— Her skulu tit siggja, hvat eg havi keypt fyri gott á uppboðnum, í hesi bráðpannuni hevur Peer Gynt stoypt silvurknapparnar hjá sær!
— Og hygg her, ein skilling fyri pengaskeppuna!
— Eingin betri, tveir skillingar fyri søluskjattuna!

— Peer Gynt? Iðan, hvør var hann?
— Ingrid kendi hann væl, og tað gjørdi eg eisini.